# Aðalfundur

Ársaðalfundur Starvsmannafelagsins verður **leygardagin 11. mars 2006, kl. 14.00 í Norðurlandahúsinum.**

**Skrá:**

1. Frásøgn formansins frá
   a) farna ári og
   b) virki felagsins framyvir.
2. Framløga av grannskoðaðum roknskapum til góðkenningar.
3. Lógarbroytingar.
4. Møgulig uppskot frá limum og nevnd.
5. Ásetan av limagjøldum.
6. Val av formanni.
7. Val av nevndarlimum og tveimum tiltakslimum.
8. Val av roknskapargrannskoðara og tiltakslimi.
9. Ymiskt.

Limir, sum vilja hava uppskot til umrøðu á aðalfundinum og møgulig lógaruppskot, mugu senda nevndini hesi í seinasta lagi **leygardagin 4. mars 2006.**

**Uppskot til formann felagsins eru:**
Gunnleivur Dalsgarð
Varðabú 32
100 Tórshavn

og

Heini Joensen
Skraddaragøta 3
188 Hoyvík

**Starvsmannafelagið**

# Aðalfundur

Ársaðalfundur í Eftirlønargrunni Starvsmannafelagsins verður **mikudagin 15. mars 2006, kl. 19.00 í hølum felagsins J. H. Schrøtersgøta 9.**

**Skrá:**

1. Frásøgn um virki grunnsins í farna roknskaparári.
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar.
3. Viðtøkubroytingar.
4. Val av nevndarlimum.
5. Ymiskt.

Limir, sum vilja hava uppskot til umrøðu á aðalfundinum og møgulig lógaruppskot, mugu senda nevndini hesi í seinasta lagi **mikudagin 8. mars 2006.**

**Nevndin**

# KYNDIL

## VEITSLA

10. mars komandi verður Kyndil 50 ár, og leygarkvøldið 11. mars verður stovningarveitsla í HB-húsinum, har ið vit sjálvsagt vænta og vóna at síggja nógv, bæði fyrrverandi og núverandi virkin kyndilsfólk.

**Borðhaldið:**
Undir borðhaldinum spæla Regin Jacobsen og Hilmar Joensen. Borðstjóri verður Hilmar Jan Hansen, og til dansin spælir Spaðar Fimm!

**Ársins leikarar:**
Á veitsluni verða ársins leikarar hjá bæði kvinnum og monnum kunngjørdir.

**Kostnaður:**
Kostnaðurin er kr. 380,-.

**Atgongumerki kunnu keypast í Kyndilshølinum í Gundadalshøllini, mánakvøld kl. 19 – 20, fram til 6. mars.**
Eisini ber til at gjalda inn á hesar kontur: Føroya Banka nr. 6460-162.967.2 og Føroya Sparikassa nr. 9181-131.498.1 og viðmerkja 50-ára veitslan

Øll frá unglingaaldri eru hjartaliga vælkomin.

**Stovningarveitsla fyri tey ungu:**
Fríggjakvøldið 17. mars verður stovningarveitsla fyri allar teir ungu limirnar, frá 10 til 16 ár í ítróttahøllini á Hálsi. Her eru allir okkara ungu limir vælkomnir saman við foreldrunum, og tað kostar einki.

**Tiltøk á veitsluni:**
Byrjað verður kl. 18.
Brotskastskapping verður kl. 18.15.
Kl. 19 verður farið til borðs.
Kl 20 verða steyp handað ársins leikara hjá øllum liðum felagsins.

**Tilmelding:**
Tilmelding fer fram hjá venjarunum.

Vit gleða okkum at síggja tykkum.

**NEVNDIN**



**Skal tú hava andlitsmyndir?**

Kom inn í 3-arin og hoyr nærri

ella ring 35 35 35

3arin

# Deyvafelag Føroya

Søkir eftir

## Skrivstovufólki

**Arbeiðsuppgávurnar fevna m.a. um:**

- Dagliga gongdin hjá Deyvafelagnum og Deyvahúsinum.
- At fyrisita Deyvafelagið undir leiðslu av nevnd felagsins.
- At skipa fyri fundum í Deyvafelagnum.
- Samskifti Deyvafelagsins við almennu myndugleikarnar.
- Samskifti Deyvafelagsins við tænastuveitandi stovnar, t.d. viðv. Sjónvarp Føroya o.ø..
- Samskifti Deyvafelagsins við útheimin m.a. Norðurlandaráðið hjá Deyvum og Danske Døves Landsforbund.
- At savna tilfar til heimasíðu Deyvafelagsins – www.deaf.fo.
- At hjálpa leiðsluni (nevndini) í Deyvafelagnum at fyriskipa tiltøkum Deyvafelagsins.
- Dagliga samskiftinum við limir Deyvafelagsins.
- Innsavning til rakstur Deyvafelagsins.
- Dagliga rakstrinum (m.a. útleiguvirksemi) og viðlíkahald av Deyvahúsinum.

**Neyðug førleikakrøv og persónsmenska:**
Søkt verður eftir fólki, ið kann arbeiða sjálvstøðugt, hevur útbúgving og royndir innan vanligt skrivstovuarbeiði, hava førleika til bókhaldsskipanina "Lundin" og annars røkja omanfyrinevndu uppgávurnar.

Men fyrst og fremst verður dentur lagdur á, at umsøkjarin hevur hug og hegni at seta seg inn í viðurskiftini teirra deyvu, at taka til sín deyvamentanina, at hava áhuga í at læra teknmál, og annars er sinnaður at brúka stóran part av orku síni at menna lívsvirði teirra deyvu.

**Arbeiðstíð og løn:**
Starvið er ¾-tíðarstarv, og verður arbeiðstíðin annars ásett í samráð við leiðslu Deyvafelagsins. Lønin er ásett sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Ásvør Ellefsen á tlf.nr. 222 381.

Umsóknarfreistin er sett til 10. mars og verður at senda skrivliga til

**Deyvafelag Føroya**
Postboks 2001
FO-165 Argir

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A



**Bygdarstovan í Hesti**

Møguleiki er nú at leiga Bygdarstovuna í Hesti.

Áhugaði kunnu ringja tlf. 32 80 35 ella 22 70 47.

www.torshavn.fo